


www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 08 - 2013

# Føroyska undirgrundin vekir áhuga

Stórur áhugi er fyri at gera forkanningar, sum skulu brúkast til oljuleiting við Føroyar. Fýra feløg hava fingið tillutað loyvi at gera kanningar í hesum árinum. Á Jarðfeingi upplýsa tey fyri oljan.fo, at ikki færri enn trý feløg, sum skjóta og tulka seismikk og gera geofysiskar kanningar og eitt oljufelag, hava forkanningarloyvi í 2013. Tey eru TGS, CGG, Dolphin Geophysical og Faroe Petroleum. Hetta kundi bent á, at tað framvegis er stórur áhugi fyri leiting eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum. Slíkar kanningar eru oftani bílagdar av oljufeløgum, sum hava eyguni eftir hesum økinum ella tað kunnu vera seismikkfeløgini sjálvi, sum fyri egnan váða og stuðul frá oljufeløgum átaka sær uppgávur. Tað kann so eisini vera eitt gott barometur fyri, hvussu stórur áhugin er fyri økinum. Vit hava eisini sæð seismikkskip í bæði føroyskum og hetlendskum sjógvi hetta seinasta árið. Hesi hava arbeitt fyri eitt nú Chevron og onnur oljufeløg, sum arbeiða vestan fyri Hetland og eisini tætt upp at føroyska markinum. Feløgini gera oftani kanningar í størri ella minni økjum, sum liggja báðumegin markið, í føroyskum og í bretskum øki. Nú 28. útbjóðingarumfarið verður í bretskum øki næsta ár vilja oljufeløgini hava hendur á seismikki, og tí hava seismikkfeløgini úr at gera. Seinasta árið hava vit sæð eitt nú Statoil standa fyri seismiskum kanningum á fleiri av sínum føroysku loyvum. Seinasta summar varð gjørd ein stór seismisk kanning á tí millum jarðfrøðingar lovandi loyvinum 016. Ein kanning, sum kostar upp móti 100 mill. kr. Sum skilst er tulkingin av data væl í gongd og fer lidna tilfarið síðani at vera partur av støðutakan, um Statoil og hini feløgini í loyvinum, einaferð í næstu framtíð fara at bora ein brunn í loyvinum. At Faroe Petroleum stendur fyri einum kanningarloyvi kemst av, at felagið eftir at hava latið innaftur síni loyvi í Føroyum fyri umleið einum ári síðani ístaðin søkti um eitt forkanningarloyvi, sum fevnir um innsavnan og tulking av

seismikki og data frá brunnum, sum eru boraðir á landgrunninum. Felagið roynir við hesum at finna fram til øki og leitimið, sum tað heldur vera áhugaverd og síðani søkja um hesi undir tí nýggju Open Door skipanini. Kortið vísir seismikk, sum er skotin á Føroyaøkinum. Artemis Atlantic hjá Dolphin Geofysical, sum skjeyt seismikk á landgrunninum fyrr í ár